600 børn og ung til jólahald í Norðurlandahúsinum

Ikki færri enn 600 børn og ung settu sin dám á jólahaldið í Norðurlandahúsinum mánakvøldið. Tað hevur verið vanligur siður seinastu árini, at børn og ung, sum fáa undirvísing við musikkskúlar í Føroyum, hittast til stórt jólahald — konsert — í Norðurlandahúsinum stutt fyri jól. Og so varð eisini í ár. Sjáldan hevur Norðurlandahúsið verið so stúgvandi fult av fólki sum hetta kvøldið, har foreldur og avvarðandi leitaðu sær niðan at hoyra og siggja børnini syngja og spæla.

Og tað má sigast, at nógv er komið burtur úr undirvísingini í vetur. Á konsertini í Norðurlandahúsinum vóru flest børn og ung frá Tórshavnar Musikkskúla, umleið 550, og so vóru nøkur úr Fuglafirði og Vágum.

Umframt barnasangkór vóru so eisini fleiri ung, sum spældu uppá ymisk ljóðføri. Har vóru so eisini fleiri av okkara musikklærarum, teirra millum Marit Mordal, sum hevur verið í Føroyum í skjótt 3 ár og undirvíst, men sum nú gevst og fer aftur til Noregs.



Børnini gingu Sankta Luciagongd



Barnasangkórið undir leiðslu av Marit Mordal



Tey ungu spældu og við klaveri Connie Kjelsen



Glað og frá børn aftana eina væleydnaða barnakonsert í Norðurlandahúsinum

